# Bilupphøgging á Strondum góðkend

**Sp/f Umhvørvisportrið hevur fingið umhvørvisgóðkenning til upphøgging av bilum og til móttøku av metalburturkasti á Strondum**

BILUPPHØGGING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Eftir at Tórshavnar kommuna og IRF í nógv ár hava verið einastu góðkendu móttakararnar av burturkasti, er Sp/F Umhvørvisportrið nú triði góðkendi móttakarin á marknaðinum.

Sp/f Umhvørvisportrið fer at taka ímóti bilum til upphøggingar og metalburturkasti. Virksemið fer fram í einum bygningi við tilhoyrandi øki uttanum á Langanesi á Strondum.

Bilar, sum koma inn, verða tappaðir fyri olju og annan løg. Battarí og útgerð, sum inniheldur kemikalii, verða tikin úr og lutir, sum kunnu brúkast aftur, verða avmonteraðir. Metalskrott verður skilt í ymiskar bólkar.

## Endurnýta sum mest

Endamálið hjá Sp/f Umhvørvisportrið er at endurnýta so nógv sum gjørligt av teimum brúktu bilunum. Tað, sum ikki kann endurnýtast, verður latið góðkendum móttakara í Føroyum, antin IRF ella Tórshavnar kommunu.

Undir viðgerðini av umhvørvisgóðkenningini hevur Umhvørvisstovan lagt serligan dent á, at dálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið, at virkið hevur tiltøk at avmarka dálking um óhapp henda, at økja um endurnýtslu og at innaneftirlit, umhvørvisstýrisskipan og skrásetingar eru sambært viður-kendum skipanum.

Umhvørvisstovan hevur eisini sett sum treyt, at økið uttanum er asfalterað og hegnað inni umframt at allar frárenningar og verjugarðar til tangagoymslur eru gjørdar, áðrenn virksemið byrjar.



*Framyvir verður bilupphøgging eisini á Strondum. Sp/f Umhvørvisportrið hevur fingið góðkenning frá Umhvørvisstovuni til at fara undir virksemið*
*Tilvildarlig mynd*






*Vágaportalurin heldur, at Føroya Tele misnýtir sína ráðandi marknaðarstøðu til at troðka allar aðrar tíðindaportalar burt, og hevur tí klagað telerisan til Kappingarráðið*
*Savnsmynd*

# Vágaportalurin klagar Føroyar Tele

**Vágaportalurin hevur sent klagu til Kappingarráðið viðvíkjandi Føroya Tele, Portal.fo og øllum undirsíðunum. – Felagið misnýtir marknaðarstøðuna, heldur Vágaportalurin**

NETMIÐLAR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Vágaportalurin skrivar í gjár, at hann hevur sent klagu til Kappingarráðið viðvíkjandi Føroya Tele, Portal.fo og øllum undirsíðunum, sum hesin almenni stovnur »tveitur út á marknaðin í løtuni.«

Vágaportalurin skrivar, at hann í klaguni millum annað vísur á støðuna í dag, har Føroya Tele hevur ráðandi marknaðarleiklut við eini fíggjarstøðu og core-business, sum ikki krevur yvirskot á ymsu tíðindaportalunum, og at hetta er misnýtsla av ráðandi marknaðarstøðu, sum skaðar tíðinda- og lýsingarkappingina.

- Almennir pengar fíggja Portal.fo og allar undirsíðurnar, tíðindaveitarar og lýsingarsølufólk, eins og web-designarar og KT-fólk, sum gevur eina ágangandi savning við nýggjum síðum, nýggjum alnets-redaktiónum og nýggjum lýsingarátøkum, skrivar Vágaportalurin.

- Vágaportalurin metir ikki, at tað er í samsvar við kappingarlógina at skula kappast móti almennum stovni, sum rekur sítt naska alnetstíðinda og alnetslýsingarvirksemi við stórum undirskoti, har Føroya Tele tó skjótt gerst monopol í tíðindaflutningi og lýsingum á alnetinum, verður millum annað sagt í klaguni, sum Vágaportalurin hevur sent Kappingarráðnum.

At enda vísur Vágaportalurin á í klaguni, at við hesi almennu, ágangandi og nasku kappingini frá Føroya Tele ber als ikki til at reka privat virksemi í tann mun sum ynskiligt er.